# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Í sambandi við yvirgang er tað í lagi at brúka upplýsingar, sum eru fingnir til vega við píning*

*(Lene Espersen, løgmálaráðharri)*

# Royndur løgreglumaður skal finna Madeleine



*Nú eru meiri enn fimm mánaðir, síðani Madeleine hvarv í Portugal*

**Portugisisku myndugleikarnir hava tilnevnt ein nýggjan leiðara at standa fyri kanningunum í málinum um ta horvnu gentuna**

Í síðstu viku legði Goncalo Ameral frá sær sum ovasti hjá teirri portugisisku løgregludeildini, sum kannar málið um ta horvnu Madeleine McCann. Hann valdi at fara frá, eftir at bretska løgreglan hevði lagt hann undir at vera ov tætt knýttan at foreldrunum Gerry og Cate McCann.

Eisini vildi bretska løgreglan vera við, at Amaral hevði latið bretum skeivar upplýsingar fyri at órógva kanningararbeiðið.

Nú er eftirmaðurin tilnevndur. Hann eitur Paulo Rebelo. Hann er ein maður við drúgvum royndum, og hansara uppgáva er nú at finna Madeleine McCann - livandi ella deyða.

## Ódn gjørt skaða fyri milliardir

Ódnin Krosa, sum hevur herjað landssynningspartin av Kina, hevur gjørt sera stóran skaða. Tað nógva regnið hevur lagt fleiri býir og stór landbúnaðarøki undir í vatni, og myndugleikarnir bera ótta fyri, at fleiri túsund hús eru so illa farin, at tey kunnu ikki umvælast. Nógvastaðni hava skriðulop kvett sambandið við fleiri bygdir, og vegakervið er illa farið.

Krosa linkaði í gjár, men kinesisku myndugleikarnir siga, at ódnin hevur gjørt skaða fyri meiri enn fimm mia. krónur.

# Vita hvør myrdi Onnu



*Anna Politkovskaja*

**Russiska ákæruvaldið veit, hvør helt skammbyrsuni, sum myrdi tíðindakvinnuna Onnu Politkovskaja, men ákæruvaldið veit ikki, hvør gav boðini um morðið**

– Vit vita, hvør lat skotini ganga av, men vit vita ikki, hvør bílegði morðið, sigur Peter Garibjan við blaðið Novaja Gaseta, sum Annan Politkovskaja arbeiddi hjá.

Peter Garibjan stendur fyri rannsóknunum í sambandi við morðið, og hann sigur seg hava fingið vissu fyri, at morðið var politiskt.

Ákæruvaldið hevur skuldsett 11 fólk í málinum og 10 teirra sita í varðhaldi. Løgreglan veit, hvør drápsmaðurin er, men hann er ikki millum tey skuldsettu ella tey tiknu.

Anna Politkovskaja varð funnin myrd uttan fyri íbúð sína í Moskva. Hon var kend fyri sínar atfinningarsomu blaðgreinar, og hon legði ikki fingrarnar ímillum, tá tað snúði seg um russiska ágangin í Kekenia og politikkin hjá Vladimir Putin, forseta.






## STUTT SAGT

### Gísli bað um hjálp

Taliban hevur aftur almannakunngjørt eina sjónbandsupptøku við týskaranum Rudolf Blechschmidt, sum bleiv burturfluttur í landspartinum Wardak í Afghanistan tann 18. juli. Á upptøkuni sigur týski verkfrøðingurin, at heilsan er farin av svíkja, og hann biður innilíga Týskland og Afghanistan taka upp samband við Taliban, so hann kann sleppa leysur, áðrenn veturin kemur. Ein annar týskari, sum bleiv burturfluttur saman við Rudolf Blechschmidt, varð funnin deyður nakrar dagar seinni. Hann var deyður og skotum.

### Ísfjall av leið

Sjóverjan í Suðurafrika hevur fingið at vita frá skipum, at eitt ísfjall, sum er einar 25 metrar breitt og einar 20 metrar høgt, rekur stutt frá suðurafrikonsku strondini. Tann seinasta fráboðanin kom frá einum fiskiskipi, sum hevði sæð ísfjallið einar 35 fjórðingar úr landi. Ein talsmaður hjá suðurafrikonsku sjóverjuni sigur, at tað er ógvuliga sjáldsamt, at ísfjøll koma so tætt at suðurafrikonsku strondini. Sambært talsmanninum er tað ikki hent í nýggjari tíð fyrr enn nú.

### Krevur endurgjald

Stjórnin í Irak krevur nú, at amerikanska vaktarfyritøkan Blackwater skal rinda 720 mió. krónur í endurgjaldi fyri ein tilburð, har vaktarmenn hjá fyritøkuni skutu 17 sivilar irakar. Endurgjaldið skal latast avvarðandi hjá teimum 17. Tað avgerandi er nú, hvat amerikonsku myndugleikarnir siga, tí sambært reglunum kunnu amerikanskar fyritøkur, sum arbeiða fyri amerikanararnar í Irak, ikki revsast.